Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 16

ISSN 0907-905X

Nr. 72

14. juni 2010

**Kunngerð**
**um**
**heilivágsskrá og fyrimyndarreglur á heilivági**

Við heimild í § 28 í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 8. mai 1991, verður ásett:

**§ 1.** Við føroyska farmakopé er at skilja Danske Lægemiddelstandarder frá 1. januar 2010.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 21 frá 13. mars 2007 um heilivágsskrá og fyrimyndarreglur á heilivági.

Heilsumálaráðið, 14. juni 2010

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

**Kunngerð um broyting í kunngerð um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 7 frá 6. februar 2009 um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 135 frá 26. oktober 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 6 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 6.* Gentur, sum eru føddar 1. januar 1995 ella seinni, kunnu, tá tær hava fylt 13 ár, verða koppsettar ímóti lívmóðurhálskrabbameini. Koppsetingarnar skulu verða framdar, innan gentan fyllir 15 ár.“

2) § 4, stk. 4 verður strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2010.

Heilsumálaráðið, 14. juni 2010

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

**Kunngerð**
**um**
**tíðaravmarkaða veiði eftir botnfiski á Føroya Banka í 2010**

Við heimild í § 9, stk. 1, nr. 3, § 9 b, stk. 5, § 29, stk. 2 og § 40, stk. 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum, verður ásett:

§ **1.** Eftir umsókn og við fiskiloyvi frá Fiskimálaráðnum er loyvt bátum undir 15 tons, sum hava rætt til fiskiloyvi í bólki 5 sambært § 28, stk. 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap, at royna við snellu, snøri ella tráðu á Føroya Banka, sambært § 9 b, stk.1 í lógini um vinnuligan fiskiskap, til og við 31. august 2010.

§ **2.** Bátar við fiskiloyvi sambært §1 kunnu fiska innan fyri eitt samlað dagatal upp á 100 fiskidagar. Fiskiskapurin skal steðga, tá hesir dagar eru brúktir.

§ **3.** Skipari/formaður á báti við fiskiloyvi sambært § 1, sum fer á Føroya Banka, skal boða Fiskiveiðieftirlitinum frá á telefon 316913, tá farið verður úr havn, og tá komið er aftur í havn.

§ **4.** Brot á § 3 verða revsað við bót.

§ **5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. august 2010.

Fiskimálaráðið, 16. juni 2010

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

# Kunngerð um reglur um persónar, ið eisini koma undir løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða

Við heimild í § 6, nr. 1) og 2), í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógini) verður ásett:

**§ 1.** Persónar, ið eru búsitandi í Føroyum og sum av arbeiðsgevara her á landi verða sendir út til fyribils arbeiði fyri arbeiðsgevaran uttan fyri Føroyar, herundir umborð á útlendskt skrásettum skipi, koma eisini undir løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, meðan teir eru uttan fyri Føroyar fyri arbeiðsgevaran, tó ikki í meira enn 2 ár.

**§ 2.** Persónar, sum eru búsitandi í Føroyum og arbeiða her á landi fyri Danmarkar ríki, og sum ikki koma undir § 83 í Lovbekendtgørelse nr. 848 af 9. Juli 2009 om arbejdsskadesforsikring, koma undir løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða.

*Stk. 2.* Ásetingin í § 15, stk. 2, í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða er eisini galdandi fyri Danmarkar ríki.

**§ 3.** Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Vinnumálaráðið, 17. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 76 17. juni 2010

**Kunngerð um broyting í kunngerð um reglur fyri skeinkingarloyvisnevndina**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 61 frá 7. mai 1992 um reglur fyri skeinkiloyvisnevndina verður § 4 orðað soleiðis:
„§ 4. Loyvisnevndin kann útvega sær hjálp til skrivaraarbeiði o.a. Samsýning til nevndarlimirnar skal landsstýrið góðkenna.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 17. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 77 17. juni 2010

## Kunngerð um broyting í kunngerð um virki og fyrisiting av Frítíðargrunninum

### § 1

Í kunngerð nr. 101 frá 12. august 1988 um virki og fyrisiting av Frítíðargrunninum verður í § 2 sett inn nýtt stk. 4:
„*Stk. 4.* Grunnurin kann samstarva við Landsbankan og aðrar fíggjarstovnar um røkt av fænum“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, tann 17. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 78 17. juni 2010

**Kunngerð um broyting í kunngerð um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 134 frá 16. oktober 2009 um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum verður í § 75 sett sum nýtt stk. 4:

„*Stk. 4*. Tænastur, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan veitir frítíðarfeløgum, sum eiga alibrúk og sleppivøtn, ella sum hava annað virksemi, ið hevur við lívfisk at gera, og sum ikki framleiða alifisk við vinningi fyri eyga, verða veittar ókeypis.“

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 17. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

# Kunngerð um gjalding av útreiðslunum til sjúkuviðgerð og uppvenjing, umframt protesur, v.m., eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini

Við heimild í § 44, stk. 5, í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða (arbeiðsskaðatryggingarlógini) verður ásett:

**§ 1.** Útreiðslur í sambandi við sjúkuviðgerð og uppvenjing av skadda, umfamt útreiðslur til útvegan ella umvæling av protesum, brillum og øðrum hjálpitólum, verða goldnar eftir reglunum í hesi kunngerð.
*Stk. 2.* Tá tað í hesi kunngerð eru knýttir rættarvirknaðir til ta umstøðu, at málið er undir viðgerð, galda hesir:
1) frá fráboðanini av skaðanum til avvarðandi tryggingarfelagið ella Vanlukkutryggingarráðið, til ráðið tekur avgerð um mein og mist vinnuføri,
2) um so er, at Vanlukkutryggingarráðið finnur, at grundarlag er fyri uppafturtøku, sbr. lógarinnar § 44, stk. 4, frá áheitanini hjá skadda um uppafturtøku, til ráðið tekur nýggja avgerð,
3) frá dagfestingini av fráboðanini hjá Vanlukkutryggingarráðnum um uppafturtøku av ráðsins ávum, tá tað ikki við tí fyrru avgerðini er ásett ein dagur fyri uppafturtøkuni, og til ráðið tekur nýggja avgerð, og
4) frá tí degi, sum Vanlukkutryggingaráðið áður hevur ásett fyri uppafturtøku av málinum, tá uppafturtøkan verður gjørd av ráðsins ávum, til ráðið tekur nýggja avgerð.

*Stk. 3.* Hevur skaddi biðið um uppafturtøku av einum máli, har Vanlukkutryggingarráðið hevur boðað tryggjaða frá, at ein fráboðaður tilburður ikki hevur havt avleiðingar, sum geva rætt til veitingar sambært lógini, sbr. lógarinnar § 32, skal málið metast at vera undir viðgerð frá fráboðanini hjá ráðnum um, at málið er endað, og til ráðið tekur nýggja avgerð.
*Stk. 4.* Verður ein avgerð kærd til Ankestyrelsen, sum hareftir vísir málið til nýggja viðgerð, skal málið metast at vera undir viðgerð frá avgerðini hjá Ankestyrelsen, og til ráðið tekur nýggja avgerð um at vísa málið til nýggja viðgerð.

**§ 2.** Útreiðslur í sambandi við sjúkuviðgerð og uppvenjing verða goldnar um so er:
1) at sjúkuviðgerðin/uppvenjingin er ein fylgja av arbeiðsskaðanum,
2) verður sett í verk undir viðgerðini av málinum og
3) av tryggingarfelagnum, ávikavist landinum ella Vinnusjúkugrunninum, ella Vanlukkutryggingarráðnum verður mett sum neyðug fyri at fáa best møguligan heilsubata.

*Stk. 2.* Tað er ein fyritreyt, at útreiðslan ikki kann gjaldast eftir lóggávuni um almenna heilsutrygd ella sum liður í eini viðgerð á almennum sjúkrahúsi.
*Stk. 3.* Uppvenjingin skal harumframt gerast sum eftirviðgerð undir læknaligum eftirliti í beinleiðis tilknýti til sjúkuviðgerðina.

**§ 3.** Útreiðslur í sambandi við neyðuga sjúkuviðgerð/uppvenjing, sum er sett í verk áðrenn ein arbeiðsskaði er fráboðaður, kunnu verða goldnar, um so er, at skaðin verður viðurkendur og treytirnar eftir § 2 annars eru loknar.
*Stk. 2.* Útreiðslur í sambandi við sjúkuviðgerð/uppvenjing, sum fer fram eftir viðgerðina av málinum, kunnu, undir tí fyritreyt, at treytirnar eftir § 2 annars eru loknar, verða goldnar:
1) um so er at sjúkuviðgerðin/uppvenjingin ella fullføranin av henni má útsetast av læknaligum ávum og er góðkend av Vanlukkutryggingarráðnum undir viðgerðini av málinum, ella
2) um so er, at eitt frammanundan tíðarliga avmarkað tal av framhaldandi sjúkuviðgerðum/uppvenjingartilgongdum, sum fyrst kunnu endast eftir viðgerðina av málinum, kunnu skjalprógvast at vera settar í verk undir viðgerðini av málinum, ella
3) um so er, at ein frammanundan tíðarliga avmarkað sjúkuviðgerð/uppvenjing, sum fyrst eru settar í verk eftir viðgerðina av málinum, kunnu skjalprógvast at vera bindandi avtalaðar undir viðgerðini av málinum.

**§ 4.** Útreiðslur í sambandi við protesur, brillur og onnur hjálpitól, sum verða útvegað undir viðgerðini av málinum, verða goldnar, undir tí fyritreyt at útveganin er neyðug fyri at tryggja útlitini av sjúkuviðgerðini ella uppvenjingini, minka um avleiðingarnar av arbeiðsskaðanum ella gjølligari at kunna áseta varandi meinið og missin av vinnuførinum.
*Stk. 2.* Undir somu treytum sum nevndar í stk. 1, verða goldnar útreiðslur til hjálpitól, v.m., sum verða flýggjaðar, eftir at Vanlukkutryggingarráðið hevur tikið avgerð um varandi mein og miss av vinniføri, um so er, at hjálpitólið v.m. kan skjalprógvast at verða bílagt áðrenn hesar avgerðir eru tiknar.
*Stk. 3.* Útreiðslur í sambandi við hjálpitól, v.m., sum nevnd eru í stk. 1 og 2, sum verða fingin til vega uttan fyri tað tíðarskeið, sum málið er undir viðgerð, verða goldnar undir samsvarandi treytum, sum ásettar eru eftir § 3 fyri gjald av útreiðslum í sambandi við

sjúkuviðgerð/uppvenjing, um so er, at treytirnar eftir stk. 1 og 2 annars eru loknar.

**§ 5.** Útreiðslur til umvæling, møguliga endurnýggjan av einum hjálpitóli, v.m., sum nevnt er í § 4, kunnu verða goldnar um so er, at hjálpitólið v.m. hevur fingið skaða ella er oyðilagt sum fylgja av arbeiðinum ella teimum umstøðum, arbeiðið fer fram undir.

**§ 6.** Kunngerðin kemur í gildi 1. juli 2010, og er galdandi fyri allar avgerðir, um teir av kunngerðini umfataðu spurningar um gjald, sum verða tiknar gildiskomudagin ella seinni.

Vinnumálaráðið, 17. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 80 17. juni 2010

**Kunngerð**
**um**
**gjald fyri raksturin av Vanlukkutryggingarráðnum**

Við heimild í § 27, stk. 5, i løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin) verður ásett:

**§ 1.** Tryggingarfeløgini, sum tekna arbeiðsskaðatryggingar, bera kostnaðin fyri raksturin av Vanlukkutryggingarráðnum sambært § 27, stk. 5, i løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða.
*Stk. 2.* Vanlukkutryggingarráðið sendur hvørt ár áðrenn 1. mars eina uppgerð til gjaldingar grundað á rakstrarkostnaðin av Vanlukkutryggingarráðnum í undanfarna ári.
*Stk. 3.* Útreiðslurnar, ið standast av ásetingunum í § 27, stk. 4, i løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, haruppií útreiðslur til vegleiðandi úttalisir frá Arbejdsskadestyrelsen, verða tó rindaðar so hvørt av viðkommandi tryggingarfelagi í sambandi við einstøku málsviðgerðina og eftir áheitan frá Vanlukkutryggingarráðnum.
*Stk. 4.* Ársgjaldið hjá tí einstaka tryggingarfelagnum verður ásett av Vanlukkutryggingarráðnum í mun til talið av fráboðanum, móttiknar frá viðkommandi tryggingarfelagi.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2010.

Vinnumálaráðið, 17. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705